# Ótarnað skapanargleði

**Tey menningartarnaðu á Verkhúsinum Stíggjur eru nærum vorðin ein ímynd av, at alt ber til, og at brek ikki nýtast at tarna, hvørki skapanargleði ella -gávum. Á Varmakeldu høvdu tey hesuferð umskapað Stórhúshøll til eitt satt fýrverkarí av litum, skapum og markleysum hugflogi**

FRAMSÝNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hetta er aðru ferð tey á verkhúsinum Stíggi sýna fram sítt skapandi arbeiði. Hesuferð vóru 16 av brúkarnum við á framsýningini, sum taldi ikki minni enn 135 myndir og lutir. Ein av teimum, ið hevur havt frálæru í myndlist við teimum á Stíggi, er Oggi Lamhauge, grafikari og pedagogur, og hesuferð var Oggi sjálvur eisini við á framsýningini við egnum grafiskum listaverkum.

### Ikki løtuverk

Tey flestu av teimum menningartarnaðu høvdu eina røð av verkum við, og tú fekk tí varhuga av, at eitt rættiliga støðugt og áhaldandi arbeiði lá aftanfyri. Í nógvum førum var tað heilt týðiligt, at talan avgjørt ikki var um nakað løtuverk. Soleiðis vóru eisini fleiri dømi um, at myndarøðir gjørdust listaverk í mátanum tey ímyndaðu sjálva listarligu gongdina og drívmegina aftanfyri.

Myndevnini vóru ógvuliga ymisk, líka frá landsløgum og menniskjum til skiftandi veðurløg og árstíðir. Eitt afturvendandi tema hjá teimum flestu tóktist tó vera abstraktar royndir við litum og teknikkum. Men sjálvt um ávirkanin frá grafikkteknikkunum hjá Ogga í ávísan mun skein ígjøgnum, hava allir listahugaðu brúkarnir á Stíggi týðiliga megnað at skapa sær sín egna sermerkta stíl.

### Sjónarvillingar og fjald list

Tvey av teimum, ið umboða heilt hvør sín máta at handfara litir og skap, eru tey bæði Magni Mikkelsen og Berit Abrahamsen. Myndirnar hjá Magna eru eitt serliga gott dømi um, hvussu tað einfalda kann rúma tí óendaliga, um tú hevur gávur til at síggja møguleikarnar og hegni til at brúka teir. Og tað hevur Magni. Við einføldum og óbrotnum strikum skapar hann eina sjónarvilling fyri og aðra eftir. Beint sum tú heldur teg fata trívídda rúmið í myndini, broytist tað, og tú sært nakað heilt nýtt og øðrvísi.

Berit tekur hinvegin støði í myndevninum, sum oftast landsøgum og menniskjum. Myndin av teimum 4 árstíðunum er bara eitt dømi um, at áhugin hjá Berit liggur serliga í royndunum við litspæli av ymsum slagi við sama myndevni.

Oggi Lamhauge hevur megnað avbera væl at geva teimum menningartarnaðu íblástur og dirvi at royna seg í listaheiminum. Og ivaleyst hevur hann eisini verið ein fyrimynd hjá onkrum. Grafisku listaverkini hjá Ogga eru hugtakandi, hóast tey øll eru so evarska smá, at tú ert líka við at ganga framvið uttan at varnast tey. Tað er næstan, sum tey teska ein varligan boðskap, sum kundi umfatað alla framsýningina: at list ofta fjalir seg, har tú minst væntar tað.

### Prýðiligir brúkslutir

Umframt myndir vóru eisini hópin av brúkslutum at síggja á framsýningini. Onkur hevði spælt sær við hugflogið við ull og ymsum tøvdum pløggum, meðan onnur høvdu verið í holt við seymimaskinu. Nógvir av lutunum vóru kanska fyrst og fremst ætlaðir at gera nyttu í til dømis køkinum. Men við sínum vøkru áseymingum og hondmálaðu heitum gjørdust eisini brúkslutirnir sermerktir prýðislutir í sær sjálvum.



*Trívíddarmyndirnar hjá Magna Mikkelsen eru ongantíð tað, tær síggja út til at vera*



*Berit Abrahamsen hevur ein serligan tokka til litspæl - sum her í teimum skiftandi árstíðunum*



*Ein heilur ævintýrheimur fjalir seg í grafisku listaverkunum hjá Ogga Lamhauge*

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag


Vika 28, 2004
www.kaupthing.fo

# Amerikanski tjóðbankin setti rentuna upp

MARKNAÐARRÁK

Á rentufundinum mikudagin setti amerikanski tjóðbankin sum væntað rentuna upp við 0,25 %-stigum. Vánalig arbeiðsloysistøl úr USA fingu lánsbrævarenturnar at falla. Partabrøvini ávirkaðust ikki í sama mun av tíðindunum, hóast tey eisini fullu eftir tveimum vikum við vøkstri.

Lánsbrævarenturnar fullu javnt í farnu viku, men tá mánaðarliga arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA fríggjadagin vísti, at einans 112.000 nýggj arbeiðspláss vóru sett á stovn í juni, móti teimum 248.000 sum væntað vóru, tóku lánsbrævarenturnar dik á seg og fullu. Rentan á 10-ára danska statslánsbrævinum fall niður í 4,42% úr 4,53% vikuna framman undan.

Amerikanski tjóðbankin, ið hækkaði rentuna 0,25 %-stig upp til 1,25%, lat eftir fundin frætta, at fleiri hækkingar eru í væntu. Hóast peningapolitikkurin enn er lagaligur, ivast teir ikki í, at amerikanski búskapurin hevur tað gott og útlitini fyri búskapar- og prísvøkstri liggja í tryggari legu, hóast marknaðirnir í seinastuni hava verið viðbreknir fyri hækkandi prísvøkstri. Hesar útsøgnirnar stiðja undir, at rentuhækkingarnar framvegis verða hóvligar. Um komandi arbeiðsmarknaðar- og prísvakstrartøl framvegis vera høg kann væntast, at næsta rentuhækkingin longu verður á komandi rentufundi í august.

Eftir rentufundin í Evropa, har rentan var óbroytt 2%, segði miðbankastjórin, at høgi prísvøksturin, sum serliga stavar frá hækkaðum olju- og rávøruprísum, kann halda áfram nakað enn. Tó broytir hetta ikki um forsøgnirnar hjá miðbankanum um, hvussu prísvøksturin verður í langa tíðarbilinum, tí enn er nógvur fríur kapacitetur í Evropa. Sostatt verður rentan í Evropu og hjá okkum mest sannlíkt, ikki broytt fyrr enn í fyrsta lagi um árskifti.

Nú nógv fólk eru farin í summarfrí kann væntast, at marknaðirnir verða friðarligir komandi vikurnar. Kaupthing metir tí, at lánsbrævarenturnar mest sannlíkt fara at halda sær á einum lágum stigi komandi tíðuna, men sum frálíður vilja góð prísvakstrartøl trýsta lánsbrævarenturnar uppaftur. Partabrøv kunnu í næstum verða ávirkaði av roknskaparkunngerðum fyri annan ársfjórðing, ið byrja at vera kunngjørdar hesa vikuna, har millum annað Yahoo og General Electric kunngerða sínar.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,67% | -0,13% |
| 5 ára lánsbræv | 3,77% | -0,14% |
| 10 ára lánsbræv | 4,42% | -0,10% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 270,5 | 2,7% |
| OMX, Svøríki | 695,2 | -0,6% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.793,5 | -1,6% |
| S&P 500, USA | 1.125,4 | -0,7% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,77 | 0,4% |
| Evru Lánsbrøv | 165,28 | 0,0% |
| Norron Partabrøv | 79,82 | 0,3% |
| Altjóða Vøkstur | 64,51 | -1,5% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 604,86 | -0,8% |
| EUR | 743,54 | 0,0% |
| GBP | 1.108,32 | -0,7% |
| NOK | 87,45 | -2,0% |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



Listarligi parturin á varmakeldustevnu:

# Eitt mentanartiltak í miljónaklassanum

**– Onkur hevur spurt, hví útlendingar í so stórum tali tóku lut í listarliga partinum av varmakeldustevnu í ár. Men eg haldi ikki, at nakað galið er við hesum. Á henda hátt fáa vit eitt listarligt portur úr útheiminum og inn til okkara, eins og vit fáa eitt portur út í heimin. At okkara nalvi er hin vakrasti, kunnu vit ikki liva av í allar ævir, sigur Petur Martin Petersen, kunningarleiðari í Fuglafirði**

VARMAKELDUSTEVNA
*Orð: Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Maria Olsen*



Tað skerst ikki burtur, at listarligi parturin á varmakeldustevnu í ár var rættiliga umfatandi og fjølbroyttur.

Største einstaka tiltakið fór av bakkastokki síðsta fríggjakvøld. Tiltakið byrjaði úti á fjørðinum sum ein ljóðmynd, har ein árabátur kom rógvandi inneftir vánni við eini kópakonu í skutinum, samstundis sum saxofon- og trompettónleikur ljóðaði um fjørðin.

Tá ið árabáturin kom at landi, steig kópakonan í landi. Nú komu fleiri sjónleikarar úr øðrum norðurlondum, kladdir í kópakonuham, uppí leikin. Øll fóru dansandi inneftir bátabrúnni. Millum standmyndirnar, sum reistar eru á ytra armi á bátahylinum, spældi Fuglafjarðar Hornorkestur, samstundis sum alt fylgið flutti seg niðaneftir bryggjuni og niðan í Mentanarhúsið. Í Mentanarhúsinum tóku trý kór um endan við eini kantatu, sum Alexandur Kristiansen, skald úr Fuglafirði, hevur skrivað. Kórini vóru Tritonus úr Danmark, Kór Langholts kirkju úr Íslandi og Fuglafjarðar Sangkór.

Heimskendu jasstónleikararnir og brøðurnir, Mikkel, Nicolay og Emil Hess úr Danmark, syrgdu saman við Edvardi Nyholm Debes fyri tónleikinum til kantatuna.

Alt endaði í einum brúsi av sangi, ljóði og tónleiki.

### Eydnaðist væl

Petur Martin Petersen, kunningarleiðari í Fuglafirði, sigur, at tiltakið eydnaðist serstakliga væl - og nógv betur, enn nakar tordi at droyma um.

– Veðrið var gott, og tónleikurin - bæði úti á fjørðinum og við bátahylin - hoyrdist væl, samstundis sum standmyndirnar á grótgarðinum við bátahylin komu til sín rætt.

Hann vísir á, at á veitsluni, sum fuglfirðingar skipaðu fyri eftir tiltakið, kom týðiliga fram, at fólk vóru sera væl nøgd.

Kunningarleiðarin sigur, at mentanarligi parturin á varmakeldustevnu var eitt tiltak í miljónaklassanum.

– Tiltakið varð ikki reist á føtur fyri at tjena pening, men fyri at profilera listarliga umhvørvið í Fuglafirði og fyri at knýta bond á listarliga- og tónlistarliga økinum.

Hann vísir á, at nógv góð bond eru knýtt, sum kunnu gerast virðismikil, bæði fyri fólk her á staððnum og fyri tey, sum vitjaðu í Fuglafirði.

### Portur út og heim

– Onkur hevur spurt, hví útlendingar í so stórum tali tóku lut í listarliga partinum á varmakeldustevnu í ár, men eg dugi ikki at síggja, at nakað er skeivt við hesum. Á henda hátt fáa vit eitt listarligt portur úr útheiminum og inn til okkara, eins og vit fáa eitt portur út í heimin, sigur Petur Martin.

Hann heldur ikki, tað ger nakað, um listin í størri mun verður meira altjóðakend og minni national, tí tann tjóðskaparligi parturin verður ikki fyri vanbýti kortini.

– Okkara nalvi er vakur, men at okkara nalvi er hin vakrasti, kunnu vit ikki liva av í allar ævir. Tí haldi eg tað vera eitt gott hugskot eisini at bjóða aðrari list vælkomnari higar til lands, sigur Petur Martin Petersen, kunningarleiðari.

# Eiga at fara útaftur á Varmakeldu

**Petur Martin Petersen harmast um, at tiltakið at fara út á varmakeldu til bál, sang, dans og hugna ikki hevur verið seinastu tvey árini á varmakeldustevnu. – Eg haldi, at vit mugu fara at tosa saman um hetta tiltak aftur, sigur kunningarleiðarin**

VARMAKELDA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Hetta er aðruferð, at vit ikki fara út á varmakeldu á varmakeldustevnu. Tað haldi eg vera spell, hóast teir stóru pengarnir ikki liggja í hesum.

Petur Martin Petersen, leiðari á Kunningarstovuni í Fuglafirði, heldur, at hetta er nakað, sum fuglfirðingar eiga at fara at tosa saman um og taka uppaftur á komandi varmakeldustevnu.

Hann sigur, at í mong ár hevur verið fastur táttur at fara út á Varmakeldu, men soleiðis var ikki í ár og heldur ikki í fjør.

– Langt afturi í søguni kunnu vit lesa um, at hetta hevur verið gamal siður.

Petur Martin heldur, at eins væl og ólavsøkan hevur sína aldargomlu søgu, hevur løtan úti á Varmakeldu sett sín serstaka varmakeldudám á stevnuna.

– Seinastu árini hevur verið vanligt at møta upp úti á Varmakeldu um 23-tíðina, og síðan plagdi tiltakið at byrja út móti midnátt, sigur kunningarleiðarin, sum vónar, at hetta tiltak verður tikið uppaftur komandi ár.

